Fjarskiftiseftirlitið



# Ársfrágreiðing 2010-2012

**Apríl 2013**

Telecommunication Authority, Skálatrøð 20, P. O. Box 73, FO 110 Tórshavn, Tel +298 35 60 20, Fax +298 35 60 35, www.fjarskiftiseftirlitid.fo

1. Fororð .......... 3

2. Fjarskiftiseftirlitið .......... 4
2.1. Fíggjarviðurskifti .......... 4
2.2. Lógargrundarlag .......... 4
2.3. At veita konsessión .......... 5
2.3.1. Konsessiónir (fjarskiftisloyvi) veittar sbrt. fjarskiftislógini § 8 .......... 5
2.3.3. Roknskaparreglur .......... 6
2.3.4. Veitingarskyldan hjá Føroya Tele .......... 6
2.4. Nummarviðurskifti .......... 6

3. Ymisk mál .......... 7
3.1. Nýggj Fjarskiftislóg .......... 7
3.2. Meting av roknskaparreglunum .......... 8
3.3. Kanning av wholesale tænastum á føroyska marknaðinum .......... 8
3.4. Avgerðin um áseting av termineringsprísum .......... 10

4. Gongdin á fjarskiftismarknaðinum .......... 13

5. Radioeftirlitsvirksemi – tilluting av frekvensum (tíddum), radioprógvum o.a. .......... 13

## 1. Fororð

Fjarskiftismarknaðurin er ein tann skjótast vaksandi vinnugrein í verðini. Føroyar hava longu í fleiri ár verið eitt av fremstu londum í heiminum innan breiðbandsdekning. Útbreiðslan av breiðbandi í Føroyum er so høg, at hon neyvan kann gerast nógv hægri í mun til fólkatalið. Talið av breiðbandshaldum ultimo 2012 var 16.455 hald. Ferðin á ávísu haldunum er eisini økt, og við árslok 2012 vóru góð 71% av haldunum, ið høvdu eina ferð millum 2 Mbit/s og 10 Mbit/s. Talið av haldum yvir 10 Mbit/s er økt við umleið 46 % frá ultimo 2011 til ultimo 2012, frá 2.377 til 3.483 hald. Nýtslan av fartelefon økist framvegis, og fartelefonin hevur umráðandi leiklut í samfelagnum innan ymisk øki, eitt nú til kunning av ymiskum slag.

Hóast Føroyar hava eitt so væl útbygd talgilt undirstøðukervi, er fjarskifti og tess undirstøðukervi ikki nakað, sum fyllir nógv í politiska kjakinum í Føroyum. Flest øll onnur lond hava politiskar málsetningar innan fjarskifti og talgildar loysnir fyri tænastur til gagns fyri húsarhald og fyritøkur í einum landi.

Føroysku fjarskiftisveitarar hava ofta verið fyri atfinningum um ov høgar prísir á sínum tænastum. Fjarskiftiseftirlitið er í ferð við at kanna eitt úrval av tænastum, sum Føroya Tele samtakið selur. Talan er yvirhøvur um tænastur, sum kervisfelagið Ft Net selur til Ft Samskifti, Vodafone og Elektron. Samanbering er gjørd við heilsøluprísir í nøkrum grannalondum. Nakrar fyribils niðurstøður er gjørdar í kanningini. Kanningin vísir, at ávísar tænastur hava kappingarførar prísir, meðan aðrar eru heldur dýrar.

Yvirskipaða endamálið við kanningini er at geva Fjarskiftiseftirlitinum nakrar greiðar ábendingar um, hvørjir prísir eru hóskandi fyri tær tænastur, sum netfelagið selur hinum fjarskiftisveitarunum.

At tað í hesum umfarið einans eru heilsøluprísirnir, ið verða kannaðir, kemur av, at heilsøluprísirnir hava avgerandi ávirkan á teir fjarskiftisprísir, sum føroysku endabrúkarar skulu gjalda, og tí er tað av stórum týdningi, at heilsøluprísirnir ikki eru ov høgir.



*Jógvan Thomsen*
*stjóri*

## 2. Fjarskiftiseftirlitið

Fjarskiftiseftirlitið er stovnur undir Vinnumálaráðnum. Fjarskiftiseftirlitið umsitur Ll. nr. 79 frá 23. mai 1997 um fjarskifti, við seinni broyting í Ll. nr. 176 frá 21. desember 2001 (fjarskiftislógin).

Fjarskiftiseftirlitið hevur eftirlit við fjarskifti og fjarskiftistænastum og tekur eisini støðu til spurningar um konsessiónsavtalur, sambindingar- og samflutningsavtalur millum fjarskiftisveitarar. Fjarskiftiseftirlitið hevur eftirlit við at krøvini, sum eru sett í fjarskiftislógini, ella við heimild í henni, verða hildin, og at kervis- og tænastuveitarar halda skyldur sínar. Til tess at røkja sína eftirlitsuppgávu hevur Fjarskiftiseftirlitið rættiliga víðar heimildir í fjarskiftislógini. M.a. hevur Fjarskiftiseftirlitið heimild til ótarnaða atgongd til fjarskiftiskervi, fjarskiftistænastu ella annan fjarskiftisútbúnað. Eftirlitið hevur heimild at útvega sær allar upplýsingar, sum tørvur er á, til tess at útinna eftirlitið, undir hesum roknskapartilfar v.m.

Radioeftirlitsdeildin umsitur frekvens- og radioloyvi til fjarskiftisveitarar, bátar/skip/flogfør, radiostøðir á landi og áhugavarparar. Radioeftirlitsdeildin hevur eftirlit við radiostøðum eins og avlurting(monitering) av frekvensum, peiling av radioórógvi. Deildin umsitur próvdømi og útskrivar siglingarradioprópvbrøv til navigatørar.

Eftirlitið er ráðgevi hjá landsstýrismanninum og miðfyrisitingini annars um faklig viðurskifti á fjarskiftisøkinum.

Fjarskiftiseftirlitið er skipað saman við Kappingareftirlitinum, Posteftirlitinum , Tryggingareftirlitinum og Skráseting Føroya. Fjarskiftiseftirlitið er skipað við einum stjóra, einum fulltrúa, tveimum starvsfólkum á Radiodeildini, bókhaldara og tveimum skrivstovufólkum. Stjórin er eisini stjóri fyri hinar fýra stovnarnar, umframt at bókhaldari og skrivstovufólk eru felags fyri teir 5 stovnarnar, umframt at fulltrúin er felags á serliga fjarskiftis- , post og kappingarøkinum



Í altjóða fjarskiftishøpi eru Føroyar í ITU (International Telecommunication Union) skrásettar sum „territorial administration“ (økisumsiting), og samskifta Føroyar beinleiðis við ITU í ymiskum viðurskiftum. Fjarskiftiseftirlitið hevur limaskap GAC (Governmental Advisory Committee) innan ICANN. ICANN er felagsskapurin, ið umsitur eyðmerkingarskipan og protokollir á internetinum. Í Føroyum er tað FO-ráðið, ið umsitur .fo navnaøkið. FO-ráðið hevur eisini GAC limaskap.

### *2.1. Fíggjarviðurskifti*

Fjarskiftiseftirlitið er á fíggjarlógini undir grein 6.38.3.17. Fjarskiftiseftirlitið (Rakstrarjáttan). Virksemið hjá Fjarskiftiseftirlitinum verður fíggjað við rakstrargjaldi og eftirlitsgjøldum.

Fjarskiftisveitarar rinda rakstrargjald (konsessiónsgjald) í mun til marknaðarpart av føroyska fjarskiftismarknaðinum, og umsitingin av Radioeftirlitsdeildini verður fíggjað við frekvens(tíddar)- og avgreiðslugjøldum.

### *2.2. Lógargrundarlag*

*Lógir*

- Løgtingslóg nr. 79 frá 23. mai 1997 um fjarskifti, sum seinast broytt løgtingslóg nr. 15 frá 17. februar 2009

*Kunngerðir, reglugerðir*

- Reglugerð nr. 1 frá 14. desember 2012 um at nýta radioútbúnað í radiotrygdartænstu á landi og á sjónum.

- Kunngerð nr. 167 frá 20. desember 2011 um frekvens og avgreiðslugjøld á radiosamskiftisøkinum
- Kunngerð nr. 1 frá 19. oktober 2010 um nýtslu av radiofrekvensum uttan einstaklingaloyvi, umframt áhugavarparaprógv og kallitekn við meira, sum seinast broytt við kunngerð nr. 3 frá 7. desember 2011
- Kunngerð nr. 108 frá 18. august 2009 um at Skipaeftirlitið útinnir ávísar uppgávur fyri Fjarskiftiseftirlitið
- Frekvensætlan 2011-2012 og Undirgreinar til frekvensætlanina 2011-2012 *(juni 2011)*
- Reglugerð nr. 2 frá 16. mai 2004 um treytir at nýta radioútbúnað í radiotænastu á sjónum (siglingaradiopróvbrøv), sum seinast broytt við reglugerð nr. 2 frá 17. mars 2011.
- Reglugerð fyri Fjarskiftiseftirlitið frá 9. juli 1999

### *2.3. At veita konsessión*

Skipanin av føroyska fjarskiftisøkinum er ásett í kap. III í fjarskiftislógini.
Sbrt. fjarskiftislógini eru tveir hættir at geva atgongd til at veita fjarskiftistænastur í Føroyum.

1. Sambært § 8 er møguleiki at veita konsessión (fjarskiftisloyvi) til fleiri á sama øki.
2. Sambært § 7 er heimilað landsstýrismanninum at undantaka ávís øki av fjarskiftinum frá einkarættinum, soleiðis at tað verður púra frælst at virka á økinum.

Politikkurin higartil hevur verið ein sonevndur ”open-door first come – first served politikkur” (opnar dyr – fyrri var – fyrri fær). Tað er einans hátturin at veita konsessión við heimild í § 8, ið hevur verið nýttur í Føroyum. Í roynd og veru hevði tað ikki verið so stórur munur, um landsstýrismaðurin valdi at nýta heimildina í § 7, har øki vóru frælsgjørd og samstundis vóru orðaðar reglur í kunngerð um prísáseting, samflutning o.ø. Hesi viðurskifti eru í dag ásett í konsessiónini.



### *2.3.1. Konsessiónir (fjarskiftisloyvi) veittar sbrt. fjarskiftislógini § 8*

Fjarskiftiseftirlitið tekur ímóti og viðgerð umsóknir um konsessión. Í samband við umsókn um konsessión eru 5 kravfestingar, alt eftir hvørja konsessión søkt verður um. Konsessiónirnar eru deildar í hesi stig:

- Konsessión á 1. stigi – kringvarpsvirksemi
- Konsessión á 2. stigi - ætlað eigarafeløgum o.tíl.
- Konsessión á 3. stigi - internet- og aðrar samskiftistænastur
- Konsessión á 4. stigi - vanliga 3. stig, íroknað telefonstøðir
- Konsessión á 5. stigi - vanliga 3. og 4. stig, umframt fartelefonikervi og –tænastur

Fjarskiftiseftirlitið viðgerð fyrst eina umsókn um konsessión, síðan verður tilmæli latið landsstýrismanninum í samskiftismálum, ið tekur endaliga støðu.

Á heimasíðu Fjarskiftiseftirlitsins sæst yvirlit yvir veittar konsessiónir.

### *2.3.2. Sambinding og samskipan av fjarskiftiskervum og fjarskiftistænastum*

Sbrt. fjarskiftislógini eru konsessiónshavarar álagdir at geva seg undir ótálmaða sambinding og samskipan av almennum fjarskiftiskervi og almennari fjarskiftistænastu. Um annar konsessiónhavi vil binda fjarskiftiskervið hjá sær upp í fjarskiftiskervið hjá viðkomandi, skulu partarnir gera sáttmála um sambindingina og treytirnar fyri henni.

Um partarnir ikki megna at gera eina avtalu innan rímiliga tíð, kunnu teir hvør sær biðja Fjarskiftiseftirlitið fáa semju í lag millum partarnar. Fær Fjarskiftiseftirlitið ikki partarnar við semju at áseta sáttmálatreytirnar, kann Fjarskiftiseftirlitið í síðsta enda áseta treytirnar fyri samanbinding.

Føroyska fjarskiftislógin er ein sonevnd rammulóg, t.e., at hon ikki neyvt ásetir, hvørjar tøkniligar sambindingar og samskipanir kunnu fara fram, men heldur lýsir nøkur fyribrigdi, ið síðani skulu metast um, um tað t.d. tøkniliga, umsitingarliga og fíggjarliga letur seg gera.

*2.3.3. Roknskaparreglur*

Eitt umráðandi grundarlag fyri at Fjarskiftiseftirlitið kann lyfta sína eftirlitsuppgávu, er roknskapartilfar, ið fjarskiftisveitararnir hava skyldu at senda Fjarskiftiseftirlitinum. Umframt skyldu at senda inn ársroknskapir og ársfrágreiðing fyri alla fyritøkuna, hava fjarskiftisveitarar eisini skyldu at senda Fjarskiftiseftirlitinum virkisøkisroknskapir. Roknskaparreglurnar eru ásettar í fylgiskjali 2 til konsessiónina. Her eru settar reglur um, hvussu veitararnir roknskaparliga skulu skilja sundur allan roknskapin í innanhýsis roknskapir, har inntøkur og útreiðslur eru býttar út á virkisøki. Ásett er m.a. ein lýsing av hvørjir býtislyklar skulu nýtast tá útreiðslur verða býttar sundur.

*2.3.4. Veitingarskyldan hjá Føroya Tele*

Sbrt. fylgiskjali 3 í konsessión til Føroya Tele frá 15. apríl 1999 hevur Føroya Tele veitingarskyldu á vanligari fastnetstelefoni (PSTN og ISDN) sbrt. neyvari treytum, ásettar í fylgiskjalinum. Tað er vanligt, at størsti veitarin á einum marknaði verður álagdur eina veitingarskyldu.

Føroya Tele er eisini álagt veitingarskyldu til grundleggjandi tænastur fyri deyv. Veitingarskyldan viðvíkjandi tænastum til deyv varð áløgd í 1999, men hesar tænastur eru tøkniliga ikki tíðarhóskandi longur.

Eisini er Føroya Tele í einum øðrum fylgiskjali til konsessiónina álagt at røkja serligar uppgávur í samband við almennu tilbúgvingarskipanina. Serligu uppgávurnar hava til endamáls at tryggja samfelagstýðandi alment veitt fjarskifti, sum fevnir um fjarskiftiskervi og fjarskiftistænastur. Hetta er neyðugt, tí tað snýr seg um uppgávur, ið hava sum endamál at fyribyrgja, avmarka og veita hjálp í sambandi við skaða á persónar, ognir og umhvørvi, tá vanlukkur, ólukkur og tílíkt henda, ella tá vandi er fyri hesum. Eitt dømi er, at Føroya Tele er álagt ókeypis at tryggja ráðlegging og at fremja tilbúgving innan fjarskifti viðvíkjandi alarmsentralinum, harundir at røkja og viðlíkahalda 112-vekslaran við tilhoyrandi tól- og ritbúnaði.



*2.4. Nummarviðurskifti*

Fjarskiftiseftirlitið umsitur einkarætt landsins til nummartilfeingi. Føroyska nummarskipanin, sum er eitt yvirlit yvir nummur til sertænastur, fastnet, fartelefoni og ymiskar serkotur, er teldutøk og er at finna á heimasíðuni hjá Fjarskiftiseftirlitinum, www.fse.fo.

Í Føroyum hava vit ikki sonevndan nummarportabilitet. Nummarportabilitetur er ein tænasta, ið merkir, at ein endabrúkari hevur møguleika at flyta sítt telefonnummar frá einum veitara til ein annan. Møguleikin fyri nummarportabilitet hevur til endamáls at bøta um kapping á fjarskiftismarknaðinum og at gera tað lættari hjá einum endabrúkara at skifta frá einum fjarskiftisveitara til ein annan, og samstundis varðveita sítt telefonnummar.

Arbeitt hevur verið við at krevja at sett verður á stovn skipan við nummarportabiliteti í Føroyum. Ein forðing fyri at veitararnir ikki longu eru álagdir at tryggja, at endabrúkarar kunnu taka telefonnummur við sær, um skift verður til annan veitara, er at føroyska fjarskiftislóggávan, manglar reglur, ið kann áseta hetta. Tað er sannlíkt at nýggja fjarskiftislógin, sum arbeitt verður við í løtuni, fer at innihalda heimild at krevja útgerð til nummarportabilitet. Ein fyribils loysn, ið framvegis verður brúkt, er ein sonevnd CNA-tænasta[1], har ein boðklivi boðar frá nýggja nummarinum hjá felagnum. Fjarskiftisveitarar hava gjørt samstarvsavtalur um hetta.

[1] CNA - Changed number announcement

## 3. Ymisk mál

*3.1. Nýggj Fjarskiftislóg*

Frælsgeringin av fjarskiftismarknaðinum í vesturheimimum byrjaði í 1990-unum og bygdi í stuttum uppá eina fría og javnlíka marknaðaratgongd til fjarskiftiskervi og almenna fjarskiftistænastu. Frælsgeringin í Evropa hevur eydnast væl. Fleiri fjarskiftisveitarar komu á marknaðin og kappingin á marknaðinum øktist við lægri prísum og nýggjum og betri tænastum sum avleiðing. Við tíðini gjørdust tey undirstøðukervi, ið almennu veitingarfeløgini høvdu ábyrgdina av at reka og menna, at meta sum natúrligur einkarættur(monopol) ella grundleggjandi hentleikar, ið allir veitarar hava fyri neyðini at hava atgeingi til fyri at kunna veita sínar tænastur í kapping við aðrar veitarar

Tilgongdin við at frælsgera(liberalisera) føroyska fjarskiftismarknaðin byrjaði, tá galdandi fjarskiftislóg var sett í gildi í 1997. Lógin staðfestir at landið hevur einkarætt til fjarskifti og byggir uppá ikki-eksklusiva atgongd til fjarskiftisnet- og tænastur, uppá líka treytir og veitingarskyldu. Lógin hevur tvinni meginhugtøk um atgeingi til fjarskiftistænastur; hitt fyrra er veitan av konsessión(fjarskiftisloyvi) og hitt seinna er frælsgering. Í Føroyum er einans hátturin við veiting av konsessiónum nýttur. Lógin og treytir settar í konsessiónirnar eru karmar fyri at skapa fortreytir fyri frælsari kapping. Álagt er konsessiónshavunum at leggja seg undir ótálmaða sambinding og samskipan av almennum fjarskiftiskervi og almennari fjarskiftistænastu. Um annar konsessiónshavi vil binda fjarskiftiskervi hjá sær uppí fjarskiftiskervi hjá viðkomandi, skulu partarnir gera sáttmála um samanbindingina og treytirnar fyri henni. Í fall ósemja er um treytirnar fyri atgongd (sambindingarsáttmálum) kann Fjarskiftiseftirlitið áseta treytir eftir seming millum partarnar.

Í 2002 varð fjarskiftislóggávan í ES víðkað við sonevndari "SMP-regulering"[2], sum er ein asymmetrisk regulering, sum heimilar regulering av veitarum við ráðandi marknaðarstøðu á nøkrum frammanundan útnevndum fjarskiftisøkjum. Føroyar er einasta land í Evropa, ið ikki hevur innført SMP-regulering.
At atgongdin til føroyska fjarskiftismarknaðin var latin upp, hevur fingið nýggjar fjarskiftisveitarar inn á fjarskiftistænastumarknaðin og á fjarskiftiskervið (mobilnet), meðan tað framvegis er einkarættur á fastnetinum. Talið av nýggjum veitarum er avmarkað og bygnaðurin á føroyska marknaðinum er framvegis ójavnur og nógv merktur av ráðandi marknaðarstøðu hjá gamla almenna einkarættveitaranum Føroya Tele.



Mett verður við hesum, at tað eru fleiri góðar grundgevingar at gera nýggja fjarskiftislóg fyri Føroyar.

Málið við nýggju lógini er at tryggja effektivitet til gagns fyri fjarskiftisbrúkarar í Føroyum. Ásetingarnar í nýggju lógini skulu verða neyðugar og lættar at umsita; fremja effektivitet og stuðla uppundir eins kappingarfortreytir; vera framtíðartryggjandi og lættar at handhevja, sæð í ljósinum av at Fjarskiftiseftirlitið framhaldandi fer at hava lítla umsiting. Mælt verður til at lógaruppskotið leggur seg upp at evropeiskari fjarskiftisregulering, tó tillagað føroysk viðurskifti. Sum áður upplýst, avmarkar støddin á føroyska fjarskiftismarknaðinum, hvussu nógvum fjarskiftisveitarum pláss er fyri. Tískil verður frameftir eisini neyðugt at hava strangar ásetingar, soleiðis at myndugleikin hevur neyðugu amboðini til munadygt at kunna leggja út í prísur, treytir og atburð hjá fyritøkum við ráðandi marknaðarstøðu.

Nýggja lógaruppskotið fer væntandi bæði at innihalda dagføring av galdandi lógarásetingum, umframt broytingar.

Ásetingarnar innan frekvensøkið verða væntandi nærum tær somu. Føroyar hava ikki trot á frekvensum og ikki er sannlíkt at tað verður trot á frekvensum í nærmastu framtíð. Tískil er neyvan neyðugt við einari serligari frekvenslóg, sum londini kring Føroyar hava. Neyðugt er við greiðum reglum, ið tryggja fyriskipað viðurskifti. Neyðugt er tó við nøkrum reglum, m.a. greiðari heimildum til at áseta nærri reglur í kunngerð/reglugerðum.

[2] SMP – **S**ignificant **M**arket **P**ower

Høvuðsbroytingin sum mælt verður til, er at sett verður í verk asymmetrisk regulering, har kervis- og tænastuveitarar við ráðandi marknaðarstøðu kunnu áleggjast nakrar serligar skyldur, t.d. ásetingar um príseftirlit. ES lóggávan er býtt upp á 18 lutamarknaðir, og fyri at staðfesta hvørt ein fjarskiftisveitari hevur ráðandi marknaðarstøðu, inniheldur fjarskiftislóggávan í Evropa reglur um, at eftirlitsmyndugleikin skal gera nærri nágreinaðar marknaðarkanningar á tí einstaka lutmarknaðinum. Føroyar hava ikki møguleika at raðfesta ta umsitingarligu orkuna soleiðis, at møguligt er at seta á stovn líknandi fyriskipan at gera marknaðarkanningar, umframt at tað er ivasamt hvørt tílík stór fyriskipan er neyðug, støddini á føroyska fjarskiftismarknaðinum og tal av veitarum, í huga.

Fyri at lætta um tær umsitingarligu byrðurnar fyri bæði eftirlitsmyndugleikan og fjarskiftisveitararnar, verður skotið upp, at veitarar við einum marknaðarparti uppá yvir 50 % á hvørjum av teimum frammanundan nágreinaðu 18 lutmarknaðum, verða útnevndir sum veitarar við ráðandi marknaðarstøðu (SMP). At tað eru sera fáir veitarar og ein stórur ójavni á flestu lutmarknaðum innan fjarskifti, ger tað álítandi at útnevna veitarar uttan marknaðarkanningar, tí úrslitið nærum er eyðsæð frammanundan.

Lógaruppskotið fer væntandi eisini at innihalda ávísar broytingar í ásetingum um rættindi hjá endabrúkarum og ásetingunum um veitingarskyldu. Veitingarskyldan skal tryggja øllum endabrúkarum atgongd til nakrar grundleggjandi fjarskiftistænastur við rímiligum treytum og til rímiligar prísir. Í nýggju lógini verður tað álagt fjarskiftisveitarum at seta upp avlurtingarútgerð- og skipanir, soleiðis at løgreglan kann gera inntriv í fráboðanarloyndina, sambært kap. 71 og 74 í rættargangslógini. Innan nummarviðurskifti verður størsta broytingin, í mun til galdandi lóggávu, at krav um nummarportabilitet væntandi verður innført. (sí pkt. 2.7.)

Arbeiðið við at gera nýggja fjarskiftislóg er tíverri komið nakað í drag, men væntað verður at eitt uppskot um nýggja fjarskiftislóg verður sent til hoyringar seinni í ár.



*3.2.Meting av roknskaparreglunum*

Sum partur av grundarlagnum fyri at Fjarskiftiseftirlitið kann røkja sítt eftirlitsarbeiðið, skulu fjarskiftisveitarar lata inn roknskapartilfar til Fjarskiftiseftirlitið. Veitararnir skulu gera serligar virkisøkisroknskapir, har inntøkur og útreiðslur hjá fyritøkuni eru lutfalsliga býttar út at virkisøki. Virkisøkisroknskapirnir skulu gerast sambært reglum settar í fylgiskjali til konsessiónina hjá veitarunum. Virkisøkisroknskapirnir hava einans til endamál at Fjarskiftiseftirlitið kann røkja sítt eftirlitsarbeiði.

Fjarskiftiseftirlitið hevur latið gera eina kanning av, hvussu hóskandi roknskaparreglurnar eru fyri at Fjarskiftiseftirlitið á nøktandi hátt kann útinna eftirlitsarbeiðið. Kanningin er gjørd serliga við kervisveitaranum FT Net fyri eyga. Niðurstøðan av kanningini er at eftirlitið kann útinnast á nøktandi hátt grundað á galdandi roknskaparreglur, men mælt verður til ymiskar neyvlýsingar, sum kunnu lætta og betra eftirlitsarbeiði og eisini viðvirka til at tryggja at veitarin heldur galdandi reglur.

Við støði í kanningini arbeiðir eftirlitið víðari við at tillaga roknskaparreglurnar. Nýggjar roknskaparreglur verða væntandi settar í gildi seinni í ár.

*3.3. Kanning av wholesale tænastum á føroyska marknaðinum*

Føroya Tele samtakið hevur ídag einkarætt á innanlanda fjarskiftisundirstøðikervinum og eina sera ráðandi støðu á sølu av uttanlandssambandinum. Fjarskiftissambandi millum Føroyar og umheimin er gjøgnum 3 sjókaðalar, SHEFA-2, Cantat 3 og Farice. Sjókaðalarnir SHEFA-2 og Cantat 3 eru ogn hjá Føroya Tele samtakinum, meðan Farice er ogn hjá íslendska felagsskapinum Farice Hf. Føroya Tele hevur tó avtalu við Farice Hf um sølu av sambandi á føroyska marknaðinum.

Fjarskiftismarknaðurin er ein týðandi marknaður við einum árligum umsetningi uppá 390 mill. kr. á tí konsessioneraða partinum.

Kappingareftirlitið vísir í ársritinum frá 2011 á, at fjarskiftistænastur eru millum 23 og 45 % hægri í Føroyum enn í Danmark. Síðan tá eru heilsøluprísirnir lækkaðir munandi. Fjarskiftiseftirlitið er av teirri hugsan, at heilsøluprísirnir hava eina avgerandi ávirkan á teir fjarskiftisprísir, sum føroysku endabrúkararnir skulu gjalda, og tí er tað av stórum týdningi, at heilsøluprísirnir ikki eru ov høgir.

Søguliga hevur fjarskiftismarknaðurin í nógvum londum verið stýrdur av einkarættsstøðum. Hetta merkir at fyrrverandi einkarættveitarin í nógvum førum er einasti kervisveitari við atgongd til øll húsarhald í landinum. Tann upprunaligi veitarin í økinum hevur tískil oftani fløskuhálstilfeingi, sum er neyðugt fyri at aðrir fjarskiftisveitarar kunnu bjóða fjarskiftistænastur til einstøku brúkararnar. Oftast gevur tað ikki meining at gera íløgur í net ella kervi á t.d. koparnetinum. Tískil velja flestu londini at regulera fjarskiftismarknaðin, soleiðis, at tað fyrrverandi einkarættfelagið verður noytt at lata upp fyri atgongd og býta fjarskiftiskervi við onnur. Hesi viðurskifti gera seg eisini galdandi í Føroyum, har Føroya Tele samtakið við sínum dóttirfelag FT Net eigur og rekur meginpartin av føroyska fjarskiftiskervinum.

Fjarskiftiseftirlitið er í ferð við gera eina kanning av heilsølutænastunum innan fjarskifti. Talan er yvirhøvur um tænastur, sum FT Net selur til FT Samskifti, Vodafone og Elektron. Kanningin er ein meting av prísum á nøkrum heilsøluvørum í Føroyum samanborið við prísir á somu vørum í nøkrum grannalondum. Londini, sum samanborið er við, eru líknandi vørur í Danmark, Svøríki, Noreg og Luksemborg. Yvirskipaða endamálið við kanningini er at geva Fjarskiftiseftirlitinum nakrar greiðar ábendingar um, hvørjir hóskandi prísirnir eru fyri tær tænastur, sum netfelagið selur hinum fjarskiftisveitarunum.

Vørunar, sum eru kannaðar, eru svart fipur, rátt kopar, BSA, MPLS/VPN, Fast forval og fartelefon terminering.



Nakrar fyribils niðurstøður eru gjørdar í kanningini og víst verður á, at ávísar tænastur hava kappingarførar prísir, meðan aðrar eru heldur dýrar. Niðanfyri er ein stuttur samandráttur av fyribils úrslitunum av kanningini.

- Svart fipur. Atgongd til fipurkaðalar, sum m.a. er neyðugt fyri at veita háferðarbreiðbandstænastur til vinnukundar)

Kanningin vísir, at tað eru stórir prísmunir ímillum londini, sum eru við í samanberingini. Frávikini á prísleguni eru lutvíst stór. FT Net skilir ímillum access ringrás og core ringrás(mellemcentrale kredsløb). Rakstrarkostnaður á access sambandi vísir stórt sveiggj. Miðal rakstrarkostnaðurin í teimum fýra londunum samanborið er við, er 71 % lægri enn rakstrarkostnaðurin á svørtum fipur hjá FT Net. Her er sostatt talan um at prísurin hjá FT Net er týðandi hægri enn i teimum fýra londunum samanborið er við. Kanningin vísir samstundis at rakstrarkostnaðurin á core ringrás er eitt sindur lægri hjá FT Net, enn miðal kostnaðurin í londunum samanborið er við. Men talan er um stór sveiggj í kostnaðinum í samanberingslondunum.

- Rátt kopar[3]

Sjálvt um avtalur eru gjørdar innan rátt kopar og deilt rátt kopar, er tað enn ikki nógv søla av hesi tænastu.

Samlaða metingin er grundað á miðal árligar kostnaðir, har bæði stovning og rakstur er íroknað. Kanningin vísir, at rátt kopar tænastan hjá er 11 % hægri í samanberingslondunum enn hjá Ft Net, meðan kostnaðir fyri deilt rátt kopar eru 10 % lægri enn prísirnir hjá Ft Net. Samlað sæð má sigast at prísirnir hjá Ft Net fyri rátt kopar eru á sama støði sum í londunum, samanborið er við.

[3] Rátt kopar er ein galvaniskur, berur, samanhangandi koparleidningur millum støðina hjá FT Net og adressuna hjá endabrúkaranum. At leidningurin er berur merkir, at eingin útgerð er knýtt at honum.
Leiga av ráum kopari er bara ætlað fjarskiftisveitarum, ið ætla sær at bjóða út almennar tænastur ella tænastur til ávísar bólkar.

- BSA[4]
  BSA tænasturnar sum Ft Net bjóðar út eru í tveimum pørtum. Fremsti parturin er "bit strøm" frá DSLAM og út til endabrúkaran. Afturat hesum, kemur framføring til skiftispunktið. Í samanberingini í kanningini verður skilt ímillum, soleiðis at BSA og framføringin verða mett um hvørt fyri seg. Til BSA tænastuna eru atknýttir stovningarkostnaðir og rakstrarkostnaðir.

  Yvirskipað vísir samanberingin av BSA og konnektivitetprísunum, at prísirnir hjá FT Net liggja undir miðal prísstøðinum í londunum samanborið er við. Kanningin vísir eisini á at føroysku prísirnir klára seg best, tá hugt verður eftir vørunum við samframleiðslu. Her skal tó havast í huga at BSA-tænastan hjá FT Net er samanborin við betri og skjótari tænastur uttanlands.

- MPLS/ VPN. (Vinnuligt breiðbandsamband millum tvey støð)
  VPN er ein háttur at byggja upp afturlatnar netskipanir, t.d. millum fleiri adressur i somu fyritøku. FT Net bjóðar eina tænastu kallað MPLS/VPN.

  MPLS/VPN skilir seg frá øðrum tænastunum í kanningini, við at henda tænasta vanliga ikki er reglerað av myndugleikunum í londunum samanborið er við, og heldur ikki verður MPLS/VPN selt við føstum treytum. Tískil er tænastan MPLS/VPN einans samanborin við líknandi tænastu hjá TDC í Danmark.

  Fyribils niðurstøðan er, at prísirnir fyri VPN tænastuna hjá TDC eru millum 58 og 86% lægri enn MPLS/VPN tænastan hjá FT Net. Hetta er største prísmunur sum er í teimum fjarskiftistænastunum, sum er samanbornar í kanningini.

- Avtala um fast forval (Atgongd til tænastur hjá øðrum veitara)
  Søguliga hevur forval verið ein av teimum fyrstu skyldunum, ið var áløgd einum veitara við ráðandi marknaðarstøðu fyri at tryggja øðrum atgongd til kervið, og at økja kappingina á fjarskiftismarknaðinum. Forval gevur endabrúkaranum møguleika at velja ein veitara við at skriva inn eina kotu, soleiðis at telefonferðslan fer yvir í net hjá øðrum veitara og annar veitari yvirtekur ábyrgdina av ferðsluni. Fast forval er ein sjálvvirkandi innskriving, soleiðis at uppkall frá einari telefon sjálvvirkandi verður stýrd yvir til kappingarneytan. Í Føroyum er ein avtala um fast forval millum Vodafone og FT Net.

  Kanningin vísir at prísirnir hjá Ft Net fyri fast forval eru væl hægri enn prísir fyri líkandi avtalur í Danmark, Norra og Luksemborg. Prísirnir í hesum londum er 73 % lægri í miðal pr. stovning. Og tað eru ábendingar um, at prísirnir fyri at gera eina avtalu um fast forval í miðal eru 40 % lægri í londunum samanborið er við.

- Fartelefonnetið (Termineringsprísir, eru prísir fyri at nýta netið hjá kappingarneyta[5])
  Fartelefon termineringsprísir eru prísir fyri at terminera ferðslu til fartelefonnetið hjá mótpartinum. Umframt hetta kann koma kostnaður fyri uppkall.

  Úrslitið av kanningini vísir at prísirnir fyri terminering í grannalondum liggja munandi undir prísleguni í Føroyum. Í miðal liggja londini samanborið er við, 61 % undir tí føroyska prísstøðinum.

  Úrslitið av kanningini hevur verið til hoyringar hjá viðkomandi fjarskiftisveitarum. Fjarskiftiseftirlitið er í ferð við at viðgera hoyringssvarini og síðan verða niðurstøður gjørdar um hvørji tiltøk verða sett í verk. Hetta verður væntandi liðugt í juni 2013.

*3.4. Avgerðin um áseting av termineringsprísum*



[4] Bit Stream Access – Tænasta nýtt til at framleiða breiðbandstænstur
[5] Talan er ikki um eina vøru, sum FT-Net selur, men sínámillum avtalur millum tænastuveitarar um nýtslu av netinum hjá hvørjum øðrum.

Vinnukærunevndin hevur í tveimum umførum tikið avgerð í klagu frá Vodafone um avgerð hjá Fjarskiftiseftirlitinum um áseting av termineringsprísum.

Innan fjarskifti er terminering ein tænasta, ein fjarskiftisveitari veitir, tá hann letur sín kunda taka ímóti einari samtalu ella dáta frá einum kunda hjá einum øðrum fjarskiftisveitara, og sum hesin fjarskiftisveitarin, sum er í kapping, hevur ført fram til markið millum báðar fjarskiftisveitararnar (originering). Terminering er soleiðis inngangandi ferðsla.

Føroysku hámarksprísirnir á terminering eru ásettir við avgerð frá Fjarskiftiseftirlitinum. Termineringsprísir eru eisini í øllum evropeisku londunum reguleraðir við maksimalprísum. Orsøkin til prísregulering innan terminering er at veitararnir eru teir einastu, sum kunnu terminera eitt kall til sínar kundar. Hetta viðførir einkarætt til terminering í egnum neti, og harvið vanda fyri áseting av órímiliga høgum prísum.

Í flest øllum londum eru asymmetriskir prísir tiknir av. Asymmetriskir termineringsprísir bera við sær, at tað verður loyvt nýggjum ella smáum veitarum at krevja ein hægri termineringsprís enn teir vanligu maksimalu termineringsprísirnir hjá teimum størru grundfestu netveitarunum. Grundgevingarnar kunnu vera, at ójavni er í kappingartreytum, umframt eitt ynski um at økja talið av fjarskiftisveitarum og harvið at tryggja kappingina millum so nógvar veitarar(útbjóðarar) sum møguligt, soleiðis at nýggir netveitarar á jøvnum føti kunnu stovna og byggja út sítt net. Asymmetriskir termineringsprísir eru sum høvuðsregla fyribils fyriskipanir, og verða niðurlagaðir í tráð við menningini av marknaðinum.

Regulering av termineringsprísum hevur verið framd eftir ymiskum leistum frá landi til land, ið eisini eru broyttir yvir tíð. Tað eru í høvuðsheitum 4 reguleringshættir til áseting av termineringsprísum. Hesir taka støði í: 1. søguligum termineringsprísum, 2. við støði í langtíðar miðal variablum kostnaði (LRAIC), 3. Við støði í retail-minus (sølukostnaði minus spardum kostnaði) ella 4. við støði í samanbering við prísir í øðrum londum (benchmark).



*Avgerðin 2004 (19.02.2004)*
Tá Kall (Vodafone) byrjaði var gjaldið hjá Føroya Tele at terminera í netinum hjá Kall tað sama sum Kall skuldi gjalda til Føroya Tele, t.e. at symmetriskir prísir vóru galdandi. Kall heitti á Fjarskiftiseftirlitið at taka støðu til umbøn frá Kall, um at felagið kundi taka eitt hægri gjald og vísti serliga á Ísland sum fordømi. Við avgerð dagfest 19. februar 2004 avgjørdi Fjarskiftiseftirlitið, at Kall kundi krevja eitt hægri gjald enn Føroya Tele. Eitt gjald varð ásett frá 1/1-2003 til 31/1-2004, ið síðan lækkaði nakað frá 17/2-2004 til 1/9-2004. Fjarskiftiseftirlitið metti, at áheitanin frá Kall um prísir, ið vóru 10% hægri ávísa tíðarskeiðið, kundi rættvísgerast við støði í rakstrarviðurskiftunum hjá Kall, søguligum termineringsprísunum, umframt prísbygnaðinum og marknaðarviðurskiftunum á GSM-økinum.
Talan var um eina fyribils avgerð, og at Fjarskiftiseftirlitið hereftir vildi taka viðgerðina upp av nýggjum. Tað framgongur eisini, at FSE skuldi taka spurningin um prísáseting upp aftur eftir 1. september 2004.

*Avgerðin 2009 (19.10.2009)*
Av ymiskum orsøkum var málið um termineringsprísir ikki veruliga endurskoðað sum ætlað, tó at arbeitt varð lutvíst við málinum. Vodafone hevur heilt fram til 1/12-2009 nýtt hesar fyribils ásettu prísirnar frá 2004, ið hava verið uml. 10 % hægri enn tilsvarandi prísir frá Føroya Tele.

Í oktober 2009 tók FSE avgerð um tillagan av termineringsprísum at verða soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| *1. desember 2009* | *Vodafone* | *FT Samskifti* |
| Uppringingargjald | 0,08 | 0,08 |
| Peak | 0,95 | 0,86 |
| Off peak | 0,62 | 0,58 |
| *1. mars 2010* | *Vodafone* | *FT Samskifti* |
| Uppringingargjald | 0,08 | 0,08 |
| Peak | 0,87 | 0,82 |
| Off peak | 0,58 | 0,58 |

| *1. juli 2010* | *Vodafone* | *FT Samskifti* |
|---|---|---|
| Uppringingargjald | 0,08 | 0,08 |
| Peak | 0,80 | 0,80 |
| Off peak | 0,58 | 0,58 |

FSE metti, at veitararnir høvdu tíð at umstilla seg, av tí at Fjarskiftiseftirlitið fyri fleiri árum síðani hevur givið sína meting viðvíkjandi tillagan av termineringsprísum til kennar, og at tað øll árini hevur verið í umbúnað at krevja prísirnir harmoniseraðar aftur, umframt settar niður.

*Avgerðin 2012 (28.09.2011) og avgerðin frá Vinnukærunevndini (03.10.2012)*
Vodafone kærdi avgerðina hjá FSE til Vinnukærunevndina, og 14. mars 2011 avgjørdi Vinnukærunevndin at heimvísa avgerðina til nýggja viðgerð, serliga við støðið í at avgerðin ikki er nóg væl grundað.

Í november 2011 tekur Fjarskiftiseftirlitið nýggja avgerð um áseting av termineringsprísum. Fjarskiftiseftirlitið viðgjørdi málið av nýggjum og metti seg hava grundgivið nøktandi fyri nýggju avgerðini, serliga við støðið í teimum treytum og viðmerkingum, ið Vinnukærunevndin hevur ávíst mangla í avgerð Fjarskiftiseftirlitsins frá 19. oktober 2009. Umframt at Fjarskiftiseftirlitið hevur gjørt umfatandi samanbering av prísunum við onnur lond, ið eftirlitið metir grundar niðurstøðu Fjarskiftiseftirlitsins. Niðurstøðan í avgerðini frá 19. oktober 2011 og nýggju avgerðini er tann sama, nevniliga at prísirnir verður tillagaðar á sama hátt og somu tíðarskeið.

Termineringsprísurin á kr. 0,80 um minuttin, sum Fjarskiftiseftirlitið ásetti, er hægri enn allir aðrir termineringsprísir í Evropa (undantikið Sveis, har prísir als ikki vórðu reguleraðir), og væl omanfyri miðaltalið fyri Evropa á kr. 0,49 um minuttin (38,9%) í juli 2009[6]. Talan er sostatt um eina sera konservativa niðurlagan í mun til teir leistir, ið verða nýttir í grannalondum. Her er tó týðandi at hava í huga, at ásetta hægstamarkið fyri terminering er at rokna sum eitt stig á leiðini til at fáa ein prís fyri terminering, sum er í tráð við veruliga kostnaðin av terminering , og at Fjarskiftiseftirlitið hevur nýtt meginregluna um varni, tá hesin prísur varð ásettur. Føroysku prísirnir vóru í 2009 umleið dupult so høgir sum miðalið fyri Evropa, og um føroysku veitararnir skuldu niður á hetta støðið, so skuldi termineringsprísurin sostatt verið skorin í helvt. Hetta varð mett at vera eitt ov stórt stig at taka í einum, um føroysku veitararin skuldu niður á prísir, sum eru galdandi í grannalondunum. Sostatt verður samanberingin nýtt til at staðfesta, at føroyskir veitarar taka ov høgan prís fyri terminering og at vísa á, at ásetti niðurskurðurin í termineringsgjøldum ikki er óvanliga stórur í mun til gongdina í sambæriligum londum. Nýggja príssamberingin sum Fjarskiftiseftirlitið hevur latið gjørt í 2012 vísir eisini at londini samanborið er við, liggja í miðal 61 % lægri í termineringsprísi í mun til Føroyar.

Nýggja avgerðin hjá Fjarskiftiseftirlitinum var aftur kærd av Vodafone og 3. oktober 2012 tók Vinnukærunevndin nýggja avgerð í málinum. Í nýggju avgerðini staðfesti Vinnukærunevndin avgerðina hjá Fjarskiftiseftirlitinum um at harmonisera termineringsprísirnar. Vinnukærunevndin leggur áherðslu á, at Vodafone ikki longur kann metast at verða nýggjur á marknaðinum og grundarlag er tískil ikki longur fyri at halda fast um asymmetriskar prísir. Vinnukærunevndin staðfesti eisini avgerðina hjá Fjarskiftiseftirlitinum um at seta prísirnar niður. Víst var til viðmæli frá ES-komissiónini og ta príssamanbering, sum Fjarskiftisetirlitið vísti á í síni avgerð. Vinnukærunevndin staðfesti eisini avgerð Fjarskiftiseftirlitsins um tillaganartíðarskeiðið. Vodafone hevur víst á at tey mettu tillaganartíðarskeiðið uppá 7 mánaðir var alt ov stutt. Avgerðin hjá Fjarskiftiseftirlitinum hevði virknað frá 1. desember 2009. Hetta broytti Vinnukærunevndin soleiðis at avgerðin um harmonisering av termineringsprísunum hevur virknað frá 28. september 2011, sum til dagfestingini, tá Fjarskiftiseftirlitið tók avgerð í málinum.

[6] Sí European Regulator Group, MTR snapshot as of 1st July 2009, ERG (09) 35

## 4. Gongdin á fjarskiftismarknaðinum

Hagtølini pr. 31. desember 2012 fyri fjarskiftisveitingar eru at finna á heimasíðu Fjarskiftsieftirlitsins www.fjarskiftiseftirlitid.fo

*Fastnet*
Talið av haldum til fastnettelefoni hevur verið fyri støðugari niðurgongd síðan 2001, og hendan gongdin hevur hildið fram í 2011 og 2012. Sama niðurgongdin sæst eisini í mun til ISDN haldarar. Bæði ferðslan innanlanda og til útlond umvegis fastnetið heldur eisini áfram við at minka. Orsøkin er sannlíkt, at kundarnir í størri mun nýta fartelefonir til telefonsamskifti, umframt at tænastur so sum VOIP og sosialu miðlanir sum heild verða nýttir bæði til innanlands- og uttanlandssamskifti. Síðan 2006 er bæði innanlanda og uttanlands ferðslan um fastnet fallin við umleið tveimum triðingum.

Tað er áhugavert, at innanlandsferðslan um VOIP er økt meir enn tíggjufaldað seinastu 5 árini. Uttanlandsferðslan um VOIP er fallin munandi (nærum 50%) síðan seinnu helvt av 2009, møguliga sum avleiðing av at iConcept fór av marknaðinum umframt kapping frá tænastum so sum Skype. Men frá 2011 til 2012 sást aftur ein lítil vøkstur í uttanlandsferðsluni á VOIP. Uttanlandsferðslan um VOIP er í 2012 økt við 4% í mun til 2011. Innanlands um VOIP er í sama tíðarskeiði økt við 56%.

*Fartelefoni*
Talið av fartelefon haldum er vaksið rættiliga støðugt seinastu 5 árini, men í 1. hálvári 2011 var fyri fyrstu ferð ein niðurgongd í fartelefonhaldum. Hetta var ein munandi lækking á meir enn 1000 hald. Í 2. hálvárið 2011 sá út til at niðurgongdin var steðgað, men í 1. hálvárið í 2012 er enn einaferð niðurgongd í fartelefonhaldum. Talan er enn einaferð um eina munandi lækking á umleið 1300 hald. Tað er serliga Vodafone sum er rakt av hesi niðurgongd í samlaða talinum av haldum. 2 hálvár 2012 sæst aftur ein lítil vøkstur í haldum. Talið á haldum ultimo 2010 var 59.446 og 58.722 ultimo 2012.



Í tíðarskeiðinum ultimo 2010 til ultimo 2012 vaks innanlandsferðslan um fartelefoni við góðum 9% og uttanlandsferðslan um fartelefoni øktist við 3%. Talið av SMS-boðum øktist við umleið 3%.

Dátuferðslan hevur verið fyri støðugum vøkstri seinastu árini. Men serliga í 2011 og 2012 hevur vøksturin verið sera stórur. Ferðslan er økt við 111% frá 2010 til 2011 og aftur 118% frá 2011 til 2012. Orsøkin til gongdina seinastu árini er uttan iva at alt fleiri fáa sær snildfonir. Yvirskipað sær út til at marknaðurin er búnaður og tískil verður avbjóðingin hjá verandi veitarum at menna nýggjar tænastur til kundan.

*Internet*
Marknaðurin fyri internet umvegis breiðbandið tykist nú at vera búnaður, og hevur verið rættuliga støðugur síðan 2009. Ein lítil niðurgongd var í breiðbandshaldum í 2011, men í 2012 er hetta vent til eina øking aftur. Talið av breiðbandshaldum ultimo 2012 er áleið hitt sama sum ultimo 2010. Ferðin á internetsambandinum heldur áfram við at økjast. Fjarskiftiseftirlitið hevur frá 2011 fingið til vega eitt endurskoðað yvirlit yvir, hvussu skjótt internetsamband føroysku fjarskiftiskundarnir hava. Talið av haldum við 2 Mbit/s ferð ella minni er alsamt fallandi. Góð 71% av haldunum hava eina ferð millum 2 Mbit/s og 10 Mbit/s. Talið av haldum yvir 10 Mbit/s er økt við uml. 46 % frá ultimo 2011 til ultimo 2012, frá 2.377 til 3.483 hald.

## 5. Radioeftirlitsvirksemi – tilluting av frekvensum (tíddum), radioprógvum o.a.

Radioeftirlitsdeildin hevur um hendi umsiting av frekvens(tíddar)- og radioloyvum til:

Bátar / Skip / Flogfør
Radiostøðir á landi
Áhugavarparar

Radioeftirlitsdeildin hevur eftirlit við hesum radiostøðum eins og avlurting (monitering) av tíddum, peiling av radioórógv o.ø. Deildin umsitur, próvdømi og útskrivar siglingarradiopróvbrøv til navigatørar.

Siglingarradiopróvbrøvini fevna um:

GOC General Operator’s Certificate
LRC Long Range Certificate
ROC Restricted Operator’s Certificate
SRC Short Range Certificate

Loyvishavararnir gjalda árligt loyvisgjald, umframt at nøkur próvbrøv skulu endurnýggjast við jøvnum millumbili.

Yvirlit yvir givin loyvir í 2011 og2012 sæst niðanfyri.

*Loyvi á radioøkinum*

| Slag av loyvi | 2011 | 2012 |
|---|---|---|
| SRC | 3 | 1 |
| ROC | 98 | 73 |
| LRC | 14 | 7 |
| GOC | 68 | **81** |
| Radioprógv íalt | **183** | **162** |



| | 2011 | 2012 |
|---|---|---|
| Báta- / skipaloyvi, ný- og umskrásetingar | 235 | 186 |
| Strikan av bátum og skipum | 63 | 57 |
| Tillutan, strikan og broytingar av MMSI-nr | 153 | 102 |

*Sjóvinnustýrið –ISO góðkenning*
Í 2011 varð Sjóvinnustýrið ISO góðkent. Av tí at fleiri av arbeiðsuppgávunum hjá Sjóvinnustýrinum nema við arbeiðsuppgávur hjá øðrum stovnum, m.a. Fjarskiftiseftirlitinum, var Fjarskiftiseftirlitið ein av pørtunum, ið skuldi koma við ískoyti til góðkenningina. Hetta var serliga innan fyri radioútgerð og loyvi til radioútgerð á skipum og bátum. Fjarskiftiseftirlitið er góðkenningarmyndugleiki til próvtøkur og útskrivingarmyndugleiki til radioprógv og til radioútgerð á skipum.

*Frekvensgjøld broytt*
Nýggj kunngerð um frekvens- og avgreiðslugjøld á radiosamskfitsøkinum var sett í gildi tann 20. desember 2011. Frekvensgjøldini eru endurskoðað og tillagað, soleiðis at tey betur lúka framtíðar áskoðan á frekvensnýtslu. Dentur er lagdur á, at frekvensgjøldini verða roknað eftir tí nýtslu av frekvensspektrinum, sum verður nýtt til tænastuna. Serliga eru tað nýtslan av radiolinkum, ið er ávirkað av broytingunum. Radiolinkar er tann tænastan sum hevur breitt seg sera nógv á frekvensbandinum. Fyrr var vanligt, at rásirnar vóru upp á 7 MHz breidd, men tey seinnu árini er hevur tað verið meira og meira vanligt, at radiolinkarnir spreiða seg yvir 28 og 56 MHz.

Nýggj, tillagað frekvensskrá við nýtsluvegleiðingum fyri Føroyar varð send til hoyringar í feburar 2013 og verður sett í gildi seinni í ár.

*Reglugerð "closed loop system":*
Tað hevur verið arbeitt við at gera smáar neyðsendarar[7] lógligar. Hesir neyðsendarar verða nýttir av fólki sum starvast í alivinnuni, fiskivinnuni og offshore vinnuni. Arbeitt hevur verið í tøttum samstarvi við danskar myndugleikar. Trafikstyrelsen hevur verið ábyrgdari, umframt at umboð frá JRCC-Danmark, Erhvervstyrelsen, Redningstjenesten, Ríkispolitiið, Hernaðarvaldinum, Radioforvaltningen í Grønlandi og Søfartstyrelsen hava verið við í arbeiðinum.

Tað hevur verið breið semja um, at skulu smáir neyðsendarar takast í nýtslu, krevst serstøk lóggáva ella reglugerð hesum viðvíkjandi, saman við eini sera tryggari skrásetingarskipan (databasu) til skráseting av upplýsingum. Eitt neyðarkall setur stórt leitingararbeiði í gongd, og tí mugu følsk neyðarkall avmarkast mest møguligt, umframt at sera umráðandi er við neyvt og rætt skrásettum upplýsingum í einum leitiarbeiði.

Hesir neyðsendarar fylla ikki nógv og eru lættir at hava uppi á sær. Hugsast kann tískil at hesir verða tiknir við á ymiskum ferðum, t.d. skíðferiu, kajaktúr, gongutúr ella líknandi. Henda neyðsendaraútgerð kemur undir tað sum verður kallað "Open loop system". Hinvegin er reglugerð lýst til "closed loop system", ið er ein skipan, har neyðsendarin sendur boð til høvuðsstøðina, sum so tekur avgerð um, hvat víðari skal henda. T.d. kundi tað verið ein skipari, sum fær neyðboð frá einum av manningini, og tí skal taka støðu til um "mayday" ella "Pan Pan" skal verða sent.

*Fyrireika 800 MHz bandið til tráðleyst net*
Rákið sum er í Evropa í løtuni er, at fleiri frekvensøki skulu setast av til tráðleyst net. Í hesum sambandi verður arbeitt við at víðka um verandi 900 MHz GSM band niðureftir, so at hetta eisini kemur at fevna um 800 MHz. Fyri at kunna víðka bandið, verður neyðugt at steðga sjónvarpssendingum á teimum hægstu UHF rásunum. Dialogur hevur verði við Televarpið og Føroya Tele um hesar broytingar. Harafturat er tikin hædd fyri hesi broyting í "Frekvensskráð Føroya" fyri 2013-2014.



*FM loyvir til nærvarp í Vestmanna og Klaksvík:*
Í 2011 vóru tvey nærvarp sett á stovn; eitt í Vestmanna og eitt í Klaksvík.

Nærvarpið í Vestmanna er eitt tilboð til ungdómin, sum heldur til í ungdómshúsinum "Staðið".Tað er Vestmanna kommuna, sum hevur evstu ábyrgd av nærvarpinum. Umframt sendingar til ungdómin, er eisini samlað nógv tilfar frá eldri og nýggjari song- og tónleikaupptøkum og aðrar upptøkur úr nærumhvørvinum.

Í Klaksvík var eisini nærvarp sett á stovn sum sp/f Home í Klaksvík eigur. Fyrstu tíðina var sendarin virkin frá "Atlantis", men er síðani fluttur longur út á eystara arm á Klaksvíkini. Sendingarnar innihalda fyri tað mesta lokalt tilfar (møti, ítrótt o.a.).

Í eini verkætlan undir Tekniska skúla í Tórshavn verður arbeitt við at royna eina øðrvísi tøkni sum roynd at útvega útvarp í Kollafjarðartunlinum. Royndarkoyringar byrjaðu á várið 2012. Fleiri tillagingar skulu gerast áðrenn útvarpið er nøktandi og Tekniski Skúli arbeiðir víðari við hesum.

*GMDSS Ráðstevnan 2012*
Í døgunum 19. til 21. september 2012 var Fjarskiftiseftirlitið vertur fyri Nordisk GMDSS Forum 2012.Luttakarar vóru úr Noregi, Danmark, Grønlandi og Føroyum.

[7] Smáu neyðsendararnir kallast í dagligum málið PLB'arar - Personal Located Beacon

Millum røðararnar var Kári Horn (MRCC) við heitinum: "Fra den virkelige verden". Jostein Petersen helt ein fyrilestur við heitinum: "Er 406 MHz fremtidens GMDSS-frekvens" og Truls K. Bui greiddi frá hvussu 2400 tímar vóru brúktir til at skriva og geva út GMDSS-lærubøkur til GOC og ROC á norskum.

Á skránni var eisini umrøða av "Eksamination i Norge", og Jan Erik Sjønsberg greiddi frá nýggjastu tøknini á økinum, t.d. nýtt Navtex og nýggjur AIS. Vitjanir vóru gjørdar á MRCC, í Kirkjubø, rundferð við báti undir Vágalandið, og eisini hjá Sjónámi í Klaksvík. Á veg aftur til Havnar varð steðgað á við Hvalastøðina við Áir.

Avgjørt var, at GMDSS-Forum 2013 verður í Austevoll Maritime Fagskole í Noregi.